

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

DESEMBUR 2025

-

ÍSKOYTI TIL "FÍGGINGARLEISTUR SUÐUROYARTUNNILIN OKTOBUR 2024"

INNIHALDSYVIRLIT

1. Inngangur 2
2. Fyritreytir 3
2.1 Fyrireikingar- og byggifasi 3
2.2 Kapitalinnskot á fíggjarlógini og lán frá Íleggingargrunninum 3
2.3 Lánsrenta 4
2.4 Afturgjaldstíð 5
2.5 Ferðslumeting og -inntøka 5
2.6 Rakstur og viðlíkahald av tunli 5
2.7 Sparing rakstur og endurnýggjan av Smyrli 5
2.8 Sparing rakstur og endurnýggjan av Sildberanum 6
2.9 Fyrivarni 6
3. Ávirkan á fíggjarlógina 6
4. Samanumtøka 10

1. Inngangur

Grundað á almenna høvuðsreglu, hevur Fíggjarmálaráðið í sambandi við fyrra uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil víst á, at grundgevast kann fyri, at loysnin við partafelagi er nýtilig til Suðuroyartunnilin, tó treytað av, at tann parturin av verkætlanarkostnaðinum, sum árligu nýtslugjøldini frá ferðsluni og árligur rakstrarstuðul frá landinum ikki kann rinda, skal rindast í fyrireikingar- og byggitíðarskeiðnum. Harumframt er ovara mark fyri árliga rakstrarstuðulin svarandi til spardu rakstrar- og løguútreiðslurnar fyri sjóvegis farleið, sum verður niðurløgd.

Út frá hesum hevur Løgmansskrivstovan staðið fyri at gera uppskot til fíggingarleist, og varð skjalið "Fíggingarleistur – Suðuroyartunnilin"

liðugt í oktobur 2024. Skjalið var fylgiskjal 11 til uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil (lm 72/2024).

Skjalið frá oktobur 2024 lýsir modellið og vísir úrslit av modellútrokningum, sum vísa samanhangin millum ymsar inntøkur til fígging av einum Suðuroyartunli, eitt nú hvussu nógv leypandi útreiðslurnar vera, við ymiskum innskotum frá byrjan, tá ávísar fortreytir eru settar upp fyri kostnað, rentu og rakstrarútreiðslur. Hetta verður víst fyri eitt nú ymiskar kostnaðarmetingar og ymiska rentu.

Fyriliggjandi skjal er ein dagføring av og kann best lesast sum framhald til skjalið frá oktobur 2024 um fíggingarleist fyri Suðuroyartunnilin. Í hesum notati verður lýst hvørjar broytingar eru gjørdar í fortreytum fyri bygging og fígging av einum Suðuroyartunli, harundir serliga dagførdar metingar av kostnaði og rentu. Síðani verða útrokningarnar endurtiknar við nýggju fortreytunum, og viðkvæmisgreiningar eru í stóran mun gjørdar eftir sama leisti sum í skjalinum frá oktobur 2024.

Til at framleiða hetta notatið hevur Løgmansskrivstovan sett seg í samband við somu partar at fáa upplýsingar, sum til skjalið frá oktobur 2024. Ikki øll tøl eru broytt, men í hesum notati fara vit stutt ígjøgnum tølini av nýggjum, eisini tey, sum eru óbroytt.

Umframt at dagføra tølini, eru eisini ávís viðurskifti lýst nærri, har viðgerðin í sambandi við uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi vegakervum og tunnilskervum í undanfarnu tingsetu vísti, at ivamál og misskiljingar vóru.

Fyriliggjandi lógaruppskot frá november 2025 gevur heimild at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, soleiðis at størsti parturin av prosjektkostnaðinum verður kendur. Tá tilboðini upp á verkætlanina eru komin inn, fæst eitt nøkulunda vist boð upp á, hvat verkætlanin fer at kosta, og tað verður eftir ætlan umleið tvey ár, áðrenn hetta verður veruleiki, og tí sigur skjalið ikki, hvat endaliga svarið er fyri nakrar av upphæddunum, sum eru partur av modellinum.

Sum víst varð á í skjalinum frá oktobur 2024, er tað í hesum sambandi eisini av týdningi at vísa á, at talan er um eitt einfalt modell, sum út frá innløgdu fortreytunum kann geva eitt kvalifiserað boð uppá, hvussu ein Suðuroyartunnil fer at ávirka fíggjarlógina. Tó verður mett, at tað er av týdningi at greina hvørja ávirkan verkætlanin at gera ein Suðuroyartunnil kann hava á fíggjarlógina, m.a. fyri at meta um, hvørt tað er fíggjarliga haldbart og realistiskt at fara víðari við verkætlanini.

Umframt dagføring av útrokningum í fíggingarleistinum, er eisini ein dagførd kostnað-nyttu greining gjørd, við serligum atliti til val av linjuføring. Kostnað-nyttu greiningin er løgd við uppskoti frá november 2025 til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, verkætlan og útboð).

2. Fyritreytir

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá teimum fyritreytum, sum eru nýttar til útrokningarnar í fíggingarmodellinum. Úrslitini av hesum eru at finna í partinum um "Ávirkan á fíggjarlógina" longri niðri í skjalinum.

Uppskotið til fíggingarleist byggir á fíggingarleistin fyri Eystur- og Sandoyartunlar, men við øðrum upphæddum: Landið setir partapening í felagið, restin verður fíggjað við láni, og til afturgjalding av láninum hevur felagið inntøkur frá brúkaragjøldum, umframt ein árligan rakstrarstuðul frá landinum, sum verður latin, tá landskassin sparir útreiðslur til siglandi farleið. P/F Eystur- og Sandoyartunlar fáa 10 mió. kr. í árligum rakstrarstuðli, sum var kostnaðurin av siglingini um Skopunarfjørð, tá lógaruppskotið varð samtykt. Ætlanin er, at P/F Suðuroyartunnilin skal fáa rakstrarstuðul, sum svarar til kostnaðin av siglingini um Suðuroyarfjørð við Smyril og til Skúvoy vil Sildberanum. Sparingina av, at tørvur ikki verður á tyrluflúgving, er tó ikki ætlanin at taka við.

2.1 Fyrireikingar- og byggifasa

P/F Suðuroyartunnilin metir, at samlaða verkætlanartíðin fyri ein tunnil við valdu linjuføringini millum Djúpadal og Sandvík, har borað verður upp í Skúvoy, verður 10,1 ár. Tí er í modellinum, eins og í oktobur 2024, nýtt ein fyrireikingar- og byggifasi upp á 10 ár. Metingar frá triðjaparti vísa, at væntaða byggitíðin møguliga kann verða millum 0,3 og 1,6 ár longri. Ein longri byggitíð kann, alt annað líka, væntast at gera verkætlanina dýrari – millum annað tí at rentuútreiðslurnar í byggitíðini verða størri, men eisini tí at arbeiðið sjálvt verður dýrari, tá tað tekur longri tíð. Hetta eru tó óvissur, sum kunnu minka, tá sáttmálar um arbeiðstøkur verða gjørdir.

2.2 Kapitalinnskot á fíggjarlógini og lán frá Íleggingargrunninum

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, sí eisini kapittul 3.3. í skjalinum um fíggingarleist frá oktobur 2024, at tað er skilagott, at eginfíggingin áðrenn byggingina er so stór sum gjørligt fyri at sleppast kann undan ov stórari rentutilskriving í byggitíðarskeiðnum.

Á fíggjarlógini verða 100 mió. kr. settar av árliga í tíðarskeiðnum 2025–2034, t.v.s. í alt 1 mia. kr. (í 2024-prísum) yvir 10 ár, sum partur av íløgukarminum í fíggjarlógini. Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnil fall burtur á ólavsøku, og tí er verkætlanin seinkað umleið eitt ár í mun til tíðarætlanina, sum varð partur av fíggingarleistinum frá oktobur 2024. Hetta merkir, at um tunnilin ikki verður liðugur í 2034, sum upprunaliga varð mett, men eitt ella tvey ár seinni, gevur tað møguleika at seta meira av í innskoti enn tær 1 mia. kr., um undirtøka er fyri tí tá. Jú størri kapitalinnskot tunnilsverkætlanin fær, tess burðardyggari verður verkætlanin, og tess minni tørvur verður á lántøku. Sí eisini viðmerkingarnar til Talvu 2.

Tað er framvegis ætlanin, at 350 mió. kr. úr Íleggingargrunninum verða settar av til verkætlanina. Í útrokningunum frá oktobur 2024 varð roknað við 350 mió. kr. frá Íleggingargrunninum í 2025. Hetta


er broytt til 2028 í nýggju útrokningunum, tá verkætlanin kemur víðari til byggifasu, og tørvurin á kapitali veksur.

2.3 Lánsrenta

Sum víst varð á í skjalinum frá oktobur 2024, legði Landsbankin fram eina meting av lánimøguleika og rentu í samráð við Nordea, har Landsbankin væntandi kemur at taka lán vegna Landsstýrið, og P/F Suðuroyartunnilin tekur lán frá Landsstýrinum við fastari rentu. Leisturin, sum Landsbankin og Nordea vísa á, er at landið veitir P/F Suðuroyartunlinum lán í 40 ár við fastari rentu, sum er byggitíðarskeiðið á 10 ár, umframt 30 ára afturgjaldstíð. Landskassin tekur lán so við og við, sum tørvur er á pengunum, við til dømis 5, 10 ella 15 ára lánum.

Samstundis sum landskassin upptekur fyrsta lánið, verður ein rentutrygging, ein sokallaður rentuswappur, keyptur, sum beinir burtur rentuváðan soleiðis, at uttan mun til, um rentan hækkar ella lækkar, so hevur rentubroytingin ikki ávirkan á lánið hjá P/F Suðuroyartunlinum.

Landsbankin hevur miðjan september verið í sambandi við Nordea um rentu, og er teirra meting, at rentan er 3,19%. Nordea nevnir í hesum sambandi, at um ein rentumarginal á 0,5% verður lagt afturat, verður samlaða rentan 3,69%, sí myndina niðanfyri.



Landsbankin vísir tó á, at í frágreiðingini frá oktobur 2024, ásetti Landsbankin ein rentumarginal á 0,85%. Hetta er sambært Landsbankanum nakað meira enn landskassin rindar fyri 5 ára lán, men neyðugt er at taka hædd fyri, at nakað av skuldini skal vera longri enn 5 ár, og tá er rentumarginalurin hægri. Harafturat er sambært Landsbankanum váði fyri, at Føroyar verða niðurrataðar. Um Føroyar verða niðurrataðar 1 stig, er mett, at tað kostar 5 bp, 15-20 bp um Føroyar verða niðurrataðar 2 stig. Eisini er neyðugt at taka hædd fyri, at nógv kann henda í 40 ár, bæði óvæntað í føroyska búskapinum og í heiminum, og tí verður metta rentan nú 4% sambært Landsbankanum.

Í sambandi við tilmælið frá Landsbankanum og Nordea um eitt lán við fastari rentu í upp til 40 ár, eigur støða at verða tikin til, um rentan skal tryggjast við eini rentutrygging, einum sokallaðum rentuswappi. Ein rentuswappur kann beina burtur rentuváðan fyri P/F Suðuroyartunnilin, soleiðis at lánið hevur somu rentu alt lánstíðarskeiðið, og at óvissur um broytingar í rentumarknaðinum ikki hava ávirkan á útreiðslurnar. Ein rentutrygging hevur tó eisini nakrar kostnaðir við sær, og kann viðføra, at møguleikin fyri at gagnnýta lægri marknaðarrentur í framtíðini minkar.

Spurningurin um statsgaranti varð eisini nevndur í skjølunum frá 2024 (sí kap. 3.3.1.), men ongin støða varð tá tikin til nakran av lánimøguleikunum, og hetta verður fyrst aktuelt, um avgjørt verður at fremja verkætlanina.

2.4 Afturgjaldstíð

Afturgjaldstíðin verður sett til 30 ár (30 ára annuitet). Í sambandi við undanfarnu tunnilsverkætlanir í Føroyum, eru brúkt 20 ára lán, men av tí, at verkætlanin at gera ein Suðuroyartunnil er so mikið stór og umfatandi, verður afturgjaldstíðin í nýggju útrokningunum framvegis 30 ár.

2.5 Ferðslumeting og -inntøka

Tað sæst ikki vera grundarlag fyri at broyta tølini fyri ferðsluna og prísin fyri at koyra gjøgnum Suðuroyartunnilin. Mett verður, at ferðslan í Suðuroyartunlinum verður 1.400 akfør tilsamans um samdøgrið (báðar vegir). Somu prísir verða nýttir, sum vórðu nýttir í sambandi við fíggingarleistin frá oktober 2024 (tøl í dagsins prísum):

- Prísur fyri vanligar bilar (persónbilar): 125 kr. (hvønn vegin)
- Prísur fyri stór akfør: 500 kr. (hvønn vegin)
- Prísur fyri vøruvognar: 225 kr. (hvønn vegin)

Fíggjarmálaráðið hevur mett um nýliga broyttu prísirnir á Suðuroyarleiðini geva orsøk til at broyta metingarnar, og tað gera teir ikki. Prísirnir á Suðuroyarleiðini lækkaðu fyri summi, men hækkaðu fyri onnur. Fíggjarmálaráðið mælir tí til, at sama meting av inntøkunum fyri felagið verður brúkt nú sum í 2024.

Halda fortreytirnar um ferðsluna og prísirnir fyri at koyra ígjøgnum Suðuroyartunnilin, verða inntøkurnar av hesum knappar 2,4 mia. kr. yvir 30 ár (í 2025 prísum), sum kann brúkast til at fíggja tunnilin.

2.6 Rakstur og viðlíkahald av tunli

Ein minni broyting, ið stavar frá vanliga prísvøkstrinum, merkir, at 26 mió. kr. verða settar av í 2025 í staðin fyri 25 mió. kr. í 2024.

2.7 Sparing rakstur og endurnýggjan av Smyrli

Somu fortreytir eru nýttar fyri at varðveita verandi farleið við *Smyrli* sum í 2024. Kostnaðurin av farleiðini er uppgjørdur í 2024 av SSL. Hesin kostnaður er í nýggju útrokningunum framroknaður við

3% fyri at fáa 2025-prísir. Útrokningarnar kunnu dagførast við nýggjum upplýsingum frá SSL fyri 2025, tá hesar fyriliggja.

2.8 Sparing rakstur og endurnýggjan av Sildberanum

Við at velja eina linjuføring fyri Suðuroyartunnilin, sum eisini fevnir um ein atkomutunnil upp til Skúvoy, er í nýggju útrokningunum innroknað ein sparing við at taka av verandi farleiðina til Skúvoy við *Sildberanum*. Til hetta endamál eru, umframt verandi nettorakstrarútreiðslur, eisini innroknaðar nýkeyp av tveimum nýggjum ferjum fyri 85 mió. kr. hvør í tíðarskeiðnum, sum er fevnt av modellinum, eins og søla av tveimum ferjum í sambandi við nýkeyp (restvirði uml. 10% av útveganarvirðinum).

2.9 Fyrivarni

Omanfyri er greitt frá, at talan er um eitt einfalt modell. Í tí sambandi kann viðmerkjast, at tað eru viðurskifti við møguligum sparingum og útreiðslum sum avleiðing av verkætlanini, sum ikki eru uppgjørd og tí ikki eru tikin við í útrokningunum. Sostatt eru møguligar sparingar í útreiðslum til tyrluflúgving til Suðuroyar og Skúvoyar ikki tiknar við, møguligar rentuútreiðslur hjá landskassanum í sambandi við keyp av nýggjum ferjum (um lánsfígging er neyðug) og útreiðslur til viðlíkahald av nýggjum vegum og tunlum á landi á Sandoy og Suðuroy.

Talva 1: Fyritreytir oktobur 2024 og 2025

	Oktobur 2024	Oktobur 2025
Planleggingar- og byggifasu	10 ár (2025-2034)	10 ár (2026-2035)
Kapitalinnskot á fíggjarlógini yvir 10 ár	1,0 mia. kr. (2025-2034)	1,0 mia. kr. (2025-2034)
Rentu- og avdráttarfrít lán frá Íleggingargrunninum	350 mió. kr. (2025)	350 mió. kr. (2028)
Lánsrenta	3,5%	4,0%
Afturgjaldstíð	30 ár (2035-2064)	30 ár (2036-2065)
Ferðsluinntøka	79 mió. kr. um árið (2035-2064)	79 mió. kr. um árið (2036-2065)
Rakstur og viðlíkahald av tunnli	25 mió. kr. um árið (2035-2064)	26 mió. kr. um árið (2036-2065)
Sparing rakstur/endurnyggjan av Smyril	146 mió. kr. um árið (2035-2064)	150 mió. kr. um árið (2036-2065)
Sparing rakstur/endurnyggjan av Sildberin	-	10 mió. kr. um árið (2036-2065)

3. Ávirkan á fíggjarlógina

Óvissa er knýtt at teimum fortreytum, sum liggja til grund fyri útrokningunum. Tískil skulu úrslitini í modellinum ikki síggjast sum heilt nágreinilig boð uppá, hvussu fíggjarlógin verður ávirkað. Endamálið er heldur at vísa, um fíggingarleisturin sum heild er haldbarur, og hvussu ymsar fortreytir kunnu ávirka fíggingina av einum møguligum Suðuroyartunli.

Modellið vísir samanhangin millum inntøkur, útreiðslur og fígging, og gevur møguleika at eftirmeta úrslitið undir ymiskum umstøðum. Tí skulu niðurstøðurnar fyrst og fremst síggjast sum eitt amboð til at meta um, hvørt ein slík verkætlan kann fíggjast innan rímilig mørk fyri fíggjarlógina.

Sum fortreyt er lagt til grundar, at møguligt hall hjá tunnilsfelagnum verður figgjað umvegis figgjarlógina. Tað merkir, at roknað verður út, hvussu stór ein møgulig árlig upphædd skuldi verið til at rinda slíkt hall.

Niðanfyri í Talva 2 eru nøkur dømi um, hvussu úrslitið á figgjarlógini verður ávirkað av broytingum í ymiskum viðurskiftum, so sum kapitalinnskoti, tunnilskostnaði og rentustøði. Sum útgangsstøði verður roknað við einum innskoti (láni) frá Íleggingargrunninum upp á 350 mió. kr., meðan restin av innskotinum verður veitt umvegis figgjarlógina.

Talva 2: Nettoávirkan árliga á figgjarlógina (2036-2065) við ymiskum samansetingum av innskoti og tunnilskostnaði (1.000 kr.)

		Tunnilskostnaður						
		4.600.000	**4.800.000**	**5.000.000**	**5.200.000**	**5.400.000**	**5.600.000**	**5.800.000**
	350.000	-63.619	-77.143	-90.667	-104.191	-117.715	-131.239	-144.763
	850.000	-31.807	-45.325	-58.843	-72.367	-85.891	-99.415	-112.939
	950.000	-25.473	-38.991	-52.509	-66.026	-79.544	-93.062	-106.580
	1.150.000	-12.804	-26.322	-39.840	-53.358	-66.875	-80.394	-93.912
	1.350.000	-135	-13.653	-27.171	-40.689	-54.207	-67.725	-81.243
	1.550.000	12.534	-984	-14.502	-28.020	-41.538	-55.056	-68.574
Kapital-	**1.750.000**	25.202	11.685	-1.833	-15.351	-28.869	-42.387	-55.905
innskot	**1.950.000**	37.871	24.353	10.835	-2.682	-16.200	-29.718	-43.236
	2.150.000	50.540	37.022	23.504	9.986	-3.532	-17.049	-30.568
	2.350.000	63.209	49.691	36.173	22.655	9.137	-4.381	-17.899
	2.550.000	75.878	62.360	48.842	35.324	21.806	8.288	-5.230
	2.750.000	88.546	75.029	61.511	47.993	34.475	20.957	7.439
	2.950.000	101.179	87.697	74.179	60.661	47.144	33.626	20.108

Viðmerking: Fyritreytir sum í Talva 1, men við ymiskum kapitalinnskoti og tunnilskostnaði.

Fyri at fáa eina fatan av, hvønn týdning rentan hevur fyri verkætlanina, kann figgingarmodellið eisini nýtast til at simulera hvussu rentustøðið, saman við ymiskum kostnaðum fyri tunnilin, ávirkar figgjarlógina, sí Talvu 3 á næstu síðu.

Við einum tunnilskostnaði uppá 4,6 mia. kr., er munurin umleið 16 mió. kr. árliga við einari rentu uppá 3,5% í mun til eina rentu uppá 4,0%, svarandi til uml. 480 mió. kr. við einari 30 ára afturgjaldstíð. Tað eigur at verða lagt til merkis, at jú hægri tunnilskostnaðurin er, tess størri týdning fær rentan fyri búskapin í verkætlanini.

Við einum tunnilskostnaði á 5,8 mia. kr., hækkar munurin millum 3,5% og 4,0% til umleið 22 mió. kr. árliga, svarandi til uml. 660 mió. kr. við einari 30 ára afturgjaldstíð. Rentan er soleiðis ein týðandi tættur í sambandi við, hvat tað í síðsta enda fer at kosta at figgja tunnilin.

Talva 3: Nettoávirkan árliga á fíggjarlógina (2036-2065) við ymiskari rentu (1.000 kr.)

		Tunnilskostnaður						
		4.600.000	4.800.000	5.000.000	5.200.000	5.400.000	5.600.000	5.800.000
Renta	2,00%	58.205	48.554	38.903	29.252	19.601	9.950	299
	2,25%	50.265	40.093	29.921	19.749	9.577	-595	-10.767
	2,50%	44.816	34.285	23.755	13.224	2.694	-7.837	-18.367
	2,75%	36.406	25.320	14.235	3.149	-7.937	-19.022	-30.108
	3,00%	30.640	19.173	7.705	-3.762	-15.229	-26.696	-38.163
	3,25%	21.750	9.692	-2.365	-14.422	-26.479	-38.536	-50.593
	3,50%	15.661	3.198	-9.264	-21.726	-34.189	-46.651	-59.113
	3,75%	6.282	-6.806	-19.895	-32.983	-46.071	-59.160	-72.248
	4,00%	-135	-13.653	-27.171	-40.689	-54.207	-67.725	-81.243
	4,25%	-10.010	-24.191	-38.372	-52.553	-66.734	-80.915	-95.096
	4,50%	-16.760	-31.396	-46.031	-60.667	-75.302	-89.938	-104.573
	4,75%	-27.139	-42.475	-57.812	-73.148	-88.484	-103.821	-119.157
	5,00%	-34.227	-50.044	-65.861	-81.677	-97.494	-113.310	-129.127

Viðmerking: Fyritreytir sum í Talva 1, men við ymiskari rentu.

Fíggjarmodellið kann, sum eisini varð greitt frá í "Fíggingarleistur – Suðuroyartunnilin" frá oktobur 2024, nýtast til at fáa eina ábending um, hvussu ávirkanin á fíggjarlógina sær út við ymiskum kapitalinnskoti og ymiskum rentum. Í døminum niðanfyri í Talva 4 er roknað við, at tunnilskostnaðurin er 4,9 mia. kr., sí Talva 4.

Talva 4: Nettoávirkan árliga á fíggjarlógina (2036-2065) við ymiskum kapitalinnskoti (1.000 kr.) og rentum

		Kapitalinnskot Íleggingargrunnurin (350 mio.kr.) + løgtingsfíggjarlóg					
		350.000	950.000	1.150.000	1.350.000	1.550.000	1.750.000
Renta	2,00%	-645	25.999	34.864	43.728	52.593	61.457
	2,25%	-11.912	16.264	25.636	35.007	44.379	53.750
	2,50%	-19.657	9.577	19.299	29.020	38.742	48.463
	2,75%	-31.629	-752	9.513	19.777	30.042	40.307
	3,00%	-39.851	-7.840	2.799	13.439	24.079	34.718
	3,25%	-52.547	-18.778	-7.557	3.664	14.884	26.105
	3,50%	-61.257	-26.275	-14.654	-3.033	8.588	20.209
	3,75%	-74.695	-37.834	-25.592	-13.350	-1.109	11.133
	4,00%	-83.905	-45.750	-33.081	-20.412	-7.743	4.926
	4,25%	-98.101	-57.941	-44.611	-31.281	-17.951	-4.621
	4,50%	-107.822	-66.283	-52.499	-38.714	-24.929	-11.144
	4,75%	-122.792	-79.120	-64.632	-50.144	-35.655	-21.167
	5,00%	-133.035	-87.895	-72.924	-57.952	-42.981	-28.009

Viðmerking: Tunnilskostnaður er settur til 4,9 mia. kr.

Sum nevnt um kapitalinnskotið á fíggjarlógini í partinum við fortreytunum fyri modellinum, fer eitt størri kapitalinnskot gjøgnum fíggjarlógina, enn tær 1 mia. kr., at gera verkætlanina meira burðardygga.

Tess størri kapitalinnskotið er í tunnilsverkætlanina frá byrjan, tess minni skal verkætlanin fíggja og gjalda aftur lán. Í hesum sambandi skal hædd tó takast fyri, at kapitalinnskotið møguliga fer at verða partvís fíggjað við landskassalánum og harvið hava við sær eina økta landskassaskuld.

Um samlaða kapitalinnskotið gjøgnum fíggjarlógina t.d. verður hækkað úr 1,0 mia. kr. til 1,2 mia. kr., soleiðis at samlaða kapitalinnskotið verður 1,55 mia. kr. (íroknað 350 mió. kr. úr Íleggingargrunninum) í staðin fyri 1,35 mia. kr., fer nettoávirkanin á fíggjarlógina árliga at broytast úr -20,4 mió. kr. til -7,7 mió. kr., við einari rentu á 4,0%. Um rentan í staðin verður 3,5%, fer nettóávirkanin á fíggjarlógina við sama kapitalinnskoti sum omanfyri at broytast úr -3,0 mió. kr. til +8,6 mió. kr. Sí eisini Talva 4 omanfyri.

Modellið kann eisini, sum eisini varð greitt frá í "Fíggingarleistur - Suðuroyartunnilin" frá oktobur 2024, nýtast til at rokna akkumuleraðar útreiðslur í tíðarskeiðinum 2026-2065 (40 ár) av:

1) verandi rakstri av Smyrli og ætlaðum íløgum í Smyril, og
2) akkumuleraðum nettoútreiðslum av tunnilsíløguni fyri ætlanartíðarskeiðið, íroknað kapitalinnskot umvegis fíggjarlógina og lán frá Íleggingargrunninum.

Tey "reyðu tølini" vísa sostatt, at mann útfrá givnu treytunum hevur havt hægri útreiðslur til tunnilsverkætlanina enn til framhaldandi ferjurakstur við endan av 2065, tá ið allar útreiðslur og inntøkur eru gjørdar upp, herundir eisini kapitalinnskotini í planleggingar- og byggifasuni.

Talva 5: Munur á akkumuleraðum útreiðslum á Smýril og tunli (1.000 kr.)

		Tunnilskostnaður						
		4.600.000	**4.800.000**	**5.000.000**	**5.200.000**	**5.400.000**	**5.600.000**	**5.800.000**
Kapital-innskot	**350.000**	-2.358.570	-2.764.290	-3.170.010	-3.575.730	-3.981.450	-4.387.170	-4.792.890
	850.000	-1.854.210	-2.249.830	-2.665.290	-3.071.010	-3.476.730	-3.882.450	-4.275.648
	950.000	-1.745.025	-2.150.030	-2.555.052	-2.970.780	-3.376.320	-3.781.860	-4.187.400
	1.150.000	-1.554.120	-1.950.459	-2.355.484	-2.760.503	-3.176.250	-3.570.532	-3.975.548
	1.350.000	-1.354.050	-1.759.590	-2.155.905	-2.560.924	-2.965.938	-3.370.961	-3.775.978
	1.550.000	-1.153.980	-1.559.520	-1.965.060	-2.370.600	-2.766.366	-3.171.385	-3.576.401
	1.750.000	-946.713	-1.359.450	-1.764.990	-2.170.530	-2.576.070	-2.981.610	-3.387.150
	1.950.000	-747.135	-1.152.152	-1.557.170	-1.970.460	-2.376.000	-2.781.540	-3.187.080
	2.150.000	-547.563	-952.586	-1.357.593	-1.762.606	-2.167.628	-2.581.470	-2.977.662
	2.350.000	-353.730	-759.270	-1.164.810	-1.563.029	-1.968.055	-2.373.066	-2.778.089
	2.550.000	-153.660	-559.200	-964.740	-1.363.459	-1.768.479	-2.181.360	-2.578.514
	2.750.000	51.175	-359.130	-764.670	-1.170.210	-1.575.750	-1.981.290	-2.378.938
	2.950.000	245.370	-154.265	-559.280	-964.298	-1.375.680	-1.781.220	-2.186.760

Viðmerking: Fyritreytir sum í Talva 1, men við ymiskum kapitalinnskoti

4. Samanumtøka.

Hetta ískoytið til fíggingarleistin frá oktobur 2024 byggir á dagførdar fortreytir fyri verkætlanina um Suðuroyartunnilin. Dagføringin fevnir serliga um nýggjar kostnaðarmetingar, dagførdar rentumetingar, og avleiðingar av valdu linjuføringini.

Modellið er sum áður, einfalt og lýsir hvussu verkætlanin kann ávirka fíggjarlógina undir ymsum fortreytum. Útrokningarnar vísa, at úrslitið er rættiliga viðkvæmt fyri broytingum í kostnaðarmeting og rentustøði.

Tað er sostatt framvegis neyðugt at arbeiða víðari við at nágreina verkætlanina, herundir at fáa inn tilboð og fáa eina neyvari kostnaðarmeting, áðrenn endalig støða verður tikin til, um tunnilsverkætlanin skal fremjast. Tað verður mett, at hetta verður møguligt, tá verkætlanin hevur verið í útboði, og tilboðini eru komin inn – væntandi umleið hálvtannað ár eftir, at fyrireikingar og prosjektering eru sett í gongd.

Um Løgtingið samtykkir lógaruppskotið frá 2025 um fyrireiking og útboð av Suðuroyartunlinum, verður arbeiðið framhaldandi at nágreina kostnað, fígging og samfelagsnyttu, soleiðis at ein samlað og dagført lýsing kann leggjast fram í sambandi við eina møguliga verklagslóg.

Til ber tá at gera eina meira ítøkiliga og nágreinaða fíggingargreining, tá bæði byggikostnaður og láni- og rentumøguleikar eru kendir. Henda greining verður tá saman við øðrum tilfari grundarlag undir endaligu politisku støðutøkuni um at gera Suðuroyartunnilin.